


Gutti Winther hevur ein langan arbeiðsdag, tí køkurin letur upp longu kl 08.00, tá til ber at fáa morgunmat og bronsj. Opið er til kl 23

MYND: EYDNA SKAALE

## Soleiðis skriva ummælararnir hjá Politiken um matin frá Gutta Winther á **Tight**:

Vit byrja við eini stórari grýtu av kræklingi, sum stendur fyri okkum, næstan áðrenn vit hava bílagt hana.

Eitt vælangandi skýggj dampar frá grýtuni, tá tænarin lyftir lokinum. Kræklingurin er perfekt tilgjørdur, vætumikil við einum fantastiksum soði í botninum á grýtuni – gjørt av hvítvíni, hvítleyki, timian, frískari persillu og øðrum smáttskorðnum kryddurtum. (...)

Síðani verða tveir tallerkar við glaseraðum dunnulørum settir fyri okkum. Skinnið er ljósabrúnt og broyskið. Kjøtið er moyrt, og orsakað av longu tilgerðartíðini í egnum feitti, dettur tað næstan sundur í sera smakkmiklum trevjum.

Tilhoyrið er einfalt. Umframt ein bita av grillaðari courgette og nøkrum ovnbakaðum sherrytomatum, sum eru sevjumiklar og søtar, liggur ein stór mongd av rustikkum eplamosi, sum ikki er tungt, men smakkar, sum tað er vent við einum mola av smøri.

Harumframt er eisini ein lítil rúgva av fínthakkaðum reyðkáli og broysknum romainesalati, sum er rundað av við eini hóskandi mongd av olju-edikkadressingi.

Vit enda við "mormors chokolademousse", sum hevur eina skeið av súrligum blommukompotti afturvið.

Vit valdu at seta eina tírættaða menu saman, men Tight er eisini eitt stað, har tú bara kanst hanga út við einum kopi av kaffi. Staðið er eitt framúr gott intiativ.

Ikki minst orsakað av, at køkurin hevur óvanliga leingi opið, heilt frá 8 til 23. Tað áttu at verði fleiri av hesum støðunum. Tað er góður matur í avslappaðum umhvørvi, og tað er stýr á tingunum, uttan at tað verður ov fínt og stívt. (...)

Umframt matinum rósa ummælararnir eisini hølunum og serveringini til skíggja.

***Alt í alt sera góð ummæli og 5 av 6 stjørnum.***

## Soleiðis skriva nakrir av lesarunum hjá Politiken um **Tight**:

"Fantastisk skeljadjór, "top" and confit, og endiliga eitt stað, har tú kanst bíleggja heimagjørt chokolátamoussé! Stórt tillukku!"

"Tað er eitt kanón gott stað! Maturin er fantastiskur og tað er nóg mikið av honum! Góð tænasta og samanumtikið ein hugnaligur stemningur"

"Eri heilt víst vorðin stamgestur! Heilt undurfull café! Tað er SO hugnaligt, at man slett ikki hevur hug at fara avstað aftur"

"Perfekt tænasta, góður matur og rættvísir prísir! Samanumtikið ein góð uppliving!! Eg eri longu stamgestur."

***Lesararnir geva super góð ummæli og geva 6 av 6 stjørnum.***

### SERLIGT TILBOÐ TIL FØROYINGAR:

Øll sum kunnu prógva, at tey eru føroyingar, t.d. við føroyskum koyrikorti ella passi, fáa 15% í avslátti av matinum á Tight restina av 2009.

### FAKTA **TIGHT**

Tight er ein matstova við trimum eigarum. Ein er úr Avstralia, ein er fraklendingur og ein er canadiari.
Chefkokkur er Gutti, sum er úr Havn.
Harumframt starvast fólk úr Nepal, Fraklandi og av Filippinunum eisini á Tight. Eingin dani starvast har.
Á Tight tosa tey enskt, franskt, føroyskt og eitt lítið sindur av donskum.
Køkurin er opin frá 8-23 og bjóðar morgunmat, bronsj, frokost og um kvøldið er tað mest líkt einum brasserie.
Maturin er erligur, merktur av árstíðini við frískum ráðvørum, og alt verður gjørt frá grundini hvønn einasta dag.
Huglagið er avslappað. Har er hugnaligt og als ikki líkt eini vanligari matstovu. Tænararnir eru í t-shirt og cowboybuksum, og veita framúr góða tænastu.
Maturin er á høgum støði, og prísirnir eru lægri enn hjá kappingarneytunum mitt inni í Keypmannahavn.
Umframt at vera matstova og café er eisini barr við lounge.
Tight liggur á Hyskenstræde 10, sum er ein síðugøta frá Stroynum í Keypmannahavn, beint við stóra H&M handilin.